# Trý túsund Dankort afturkallað

*Ein hýruvognsførari og ein matstova hava kopierað upplýsingarnar av gjaldskortum hjá kundum, og hava brúkt meiri enn eina hálva millión krónur av teirra pengum uttanlands. Fyribils eru tveir mans ákærdir og PBS hevur afturkallað 3000 kort*

Sveinur Tróndarson

Tað gjørdist ein dýrur umgangur at fara út at eta og at koyra í hýruvogni. Jyllandsposturin skrivar í dag um nakrar danir, sum brádliga vóru varugir við, at kort teirra varð misnýtt av øðrum.

Ein vinnulívsmaður fekk ein álvarsligan skelk eftir at hann hevði verið í hýruvogni í Keypmannahavn. Rokningin upp á túrin var ikki so stór – einar tvey hundrað krónur – men í vikunum eftir túrin vórðu 13 túsund krónur trektar av konto hansara frá einum terminali í Turkalandi.

- Nógv eru tikin við nøsini. Hýruvognsførarin hevur lisið kortnummari og dagfestingina nær kortið gongur út og hann hevur so latið upplýsingarnar víðari. Kortini eru so brúkt til at keypa flogferðaseðlar í Turkalandi, sigur Ole Wagner, frá løgregluni í Keypmannahavn. Hann leggur afturat, at hýruvognsførarin er handtikin og ákærdur.

Misnýtslan av kortunum er upp á meiri enn eina hálva millión krónur. Løgreglan í Keypmannahavn veit í løtuni ikki, hvat slag av terminalum eru brúktir til misnýtsluna, men teir fáa nú hjálp frá turkisku løgregluni at kannað málið, og í gjár handtókn turkiska løgreglan ein mann í málinum.

Hin parturin av misnýtsluni snýr seg um matstovugestir, sum eru vornir snýttir upp um bæði oyru. Ein tænari á eini matstovu í Keypmannahavn hevur kopierað upplýsingarnar, sum standa á magnetstrípuni. Síðani hevur hann sent upplýsingarnar til sínar samseku í Spania og í Portugal, sum so hava tikið fitt av peningi frá matstovugestunum. Av tí at eingin veit, hvussu nógv fólk eru tikin við nøsini, hevur PBS avgjørt, at afturkallað 3000 kort, sum hava verið brúkt á matstovuni. Kortini verða skift út og kundarnir fáa nýggj ístaðin.

Heldur ikki løgreglan veit, hvussu umfatandi misnýtslan er. – Vit vita um meiri enn 50 tilburðin, men eru ikki vísir í, at tað er alt. Tí heita vit á fólk um at vera serliga varin tá tey brúka gjaldskort, sigur Ole Wagner. – Hetta slagið av misnýtslu hava vit ikki sæð fyrr. Men tað undirstrikar bara, at fólk skulu vera sera varin tá tey brúka kort, og at tey ikki skulu lata kvittanir liggja og flóta, sigur hann og leggur afturat at løgreglan væntar, at onnur eru við í misnýtsluni enn teir báðir, sum eru handtiknir.

Lars From, stjóri í PBS, váttar, at kortini eru skift, men sigur, at hvørki kundarnir ella PBS, koma at bera tapið av misnýtsluni. – Tað verður forrætningin í útlandinum, sum missir peningin, greiðir hann frá.

Heldur tú, at onkur misbrúkar kort títt, so skalt tú venda tær til tín peningastovn og har boða frá, at kortið verðu misnýtt.

Samstundis skrivar tú undir eina váttan um, at tað ikki er tú, sum hevur brúkt peningin. – Eftir tað fær kundin peningin aftur, og vit fara inn at kanna málið. Fer okkurt ólógligt fram, verður málið latið løgregluni, sigur Lars From.

## TenSing kór í KFUM & M

Ofta hevði verið tosað um at fingið eitt sangkór, og í fjør vóru vit so heppin at fáa ein ungan norðmann frá Sandnes, Vemund Svendsen, at seta á stovn eitt TenSing kór og eydnaðist hetta sera væl og nú heldur hann fram í ár. Vit eru ógvuliga takksom fyri hansara stóra arbeiði og fyri hvussu væl hann dugir við ungdóminum. Vit lataVemund sjálvan greiða frá.

**Sound of Glory**

Onsdag 23. august starter TenSing koret Sound of Glory opp igjen efter sommerferien. Vi ønsker alle nye medlemmer hjertelig velkommen.

Sound of Glory ble startet i oktober i fjor, og har nå ca. 35 medlemmer. Det er kormedlemmene selv som bestemmer hvilke sanger vi skal synge, og i fjor hadde vi god variasjon i repertoaret. Men det er ikke bare repertoaret som bestemmes av kormedlemmene. Vit har også et styre, bestående av 5 ungdommer som tar seg av den daglige driften av koret, andakter og litt mer spesielle sosiale aktiviteter. Miljøet i koret er veldig bra og vi prøver å gjøre ting som vedlikeholder dette. I fjor hadde vi blant annet en »Cowboy-fest« som var en stor suksess.

Det store høydepunktet i vår historie så langt må likevel være Norgesturen vår. I juni var vi nemlig på en litt over to uker lang tur i Norge, hvor vi blandt annet fikk med oss et stort ungdomsstevne (TT) med over 2.500 ungdommer - en opplevelse vi kommer til å huske lenge! I tillegg bestod turen av sight-seeing, shopping, rafting, to konserter i Sandnes Kulturhus og mye mer. Vi knyttet også nære kontakter med et norsk TenSing kor - Bukkene Bruse - og har invitert dem til å komme og besøke oss neste sommer.

Hvis dette høres interessant ut for deg er det bare å møte opp i KFUM onsdag kl. 19.00. Du trenger ikke å kunne synge for å være med, det eneste kravet som stilles er at du er mellom 13 og 19 år - og har lyst til å ha det gøy!

**KFUK**

Frá byrjan av hava hóskvøldini verið føst fundarkvøld fyri tær vaksnu við ymiskum á skránni, so sum bíbliutímar, ytrimissión, hugnakvøld o.a. Nú er broytt: Eitt hóskvøld um mánaðin hava tey ungu, eitt hóskvøld er fyri tey yvir 29 ár, hini 2 ella 3 eru sum vant.

Hetta fyrsta hóskvøldið verður ungdómskvøld kl. 21.00.

**KFUM**

Hvørt fríggjakvøld er opið hús í KFUM fyri ung frá kl. 20.00

KFUM og KFUK hava leiðaraskeið saman við skótunum komandi leygardag í KFUK frá kl. 8.50 til kl. 18. Neyðugt er at melda seg til á tlf. 311928.

## Varsemið alt at siga

*Í Føroya Banka vita tey ikki um nakað tilfeldi av beinleiðis misnýtslu, men kortini leggja tey fólki eina við, at vera meiri enn varin tá tey brúka FR-kortið*




Sveinur Tróndarson

- Tað er so nógv lættari at brúka FR-kort; ella FR-VISA …

Jú, víst er tað tað, men tað kann eisini vera so nógv vandamiklari. Fleiri tilburðir í Danmark benda nevniliga á, at tað er nógv lættari at misnýta kortini enn fyrr hevur verið hildið, og tí krevur tað størsta varsemið og ansnið tá kortið verður brúkt.

Seinastu tíðina hava fleiri tilburðir av misnýtslu verið av donskum gjaldskortum. Við hvørt er kotan avlisin og í øðrum føri er bara kortnummarið og dagfestingin tá kortið gongur út avlisið, og við tí hava bandittarnir frítt spæl.

Fyri heilt stuttari tíð síðani skifti PBS, sum hevur ábyrgdina av gjaldskortunum 3000 kort út, tí tey vóru í vanda fyri at vera misnýtt, eftir at tey vóru brúkt á eini matstovu. Eitt av starvsfólkunum hevði kopierað tað sum stendur í magnetstrípuni, og misnýtt kortini.

Í Føroya Banka vita tey ikki um nakran slíkan tilburð av misnýtslu. Onkrar løgnar sakir hava verið, men eingin har kortið er misnýtt á sovornan hátt. – Síðani møguleikin kom at brúka kortið at gjalda við á internetinum, hava vit havt onkrar løgnar sakir av tí slagnum, men tað er bert talan um smávegis upphæddir, verður sagt úr Føroya Banka.

- Men vit vita um at onkur er snýttur t. d. í Italia. Tá er kortið koyrt tvær ferðir gjøgnum sletuna, sum varð brúkt í gomlum døgum, og tá kundin er farin út aftur, hava tey, sum arbeiða ella eiga handilin, falsað undirskrivtina. Og so vita vit sjálvandi um, at onkur hevur fingið kortið stjolið beint eftir at tey hava goldið við tí. Í slíkum føri hevur tann, sum stjelur kortið ofta lúrt kotuna av.

- Annars eru hyggjuráðini at vera serliga varin tá ein brúkar kortið. Syrg fyri at eingin sær tá tú trýstir kotuna inn, og ert tú á netinum, so lat vera við at geva kortupplýsingarnar á síðum, sum ikki eru seriøsar. Her vera fólk ofta bóndafangaði til at geva upplýsingarnar, sum standa á kortinum, og uttan at tey vita tað, hava tey givið fyritøkuni, sum eigur heimasíðuna loyvið til at taka peningin av konto teirra.

Tað er eftir øllum at døma ein trupulleiki, at dagfestingin nær kortið gongur út, stendur á kortinum og á kvittanum, sum verða útskrivaðar tá kortið verður brúkt. Dagfestingin tryggjar at kortupplýsingarnar eru rættar og tí hava misnýtararnir lættari spæl. Sum skilst hevur PBS borið so í bandi, at dagfestingin ikki longur kemur á útskriftina, og tað ger tað so mikið torførari at misnýta tey.

- Kortini eru tað kundarnir, sum í fyrsta umfari skulu tryggja at teirra kort ikki verður misnýtt og tað gerst bara við at vera varin. Tá tú ert til handils og serliga tá tú ferðast á internetinum. Tá hevur tú alla orsøk at vera serliga ansin.



# Dysturin um internetbrúkararnar kann byrja

*Eftir at tað ikki bar til at fáa semju í lag millum Føroya Tele og komandi kappingarneytan Alnót, hevur Fjarskiftiseftirlitið nú tikið avgerð í málinum og ásett prísin, ið Alnót skal gjalda fyri at leiga seg inn á fasta telefonnetið hjá Føroya Tele. Soleiðis er nú klárt er at byrja dystin um privatu internetbrúkararnar*

Rúnar Reistrup

Eitt ár eftir at nýggja telefyrtøkan Alnót tók upp samráðingar við Føroya Tele um at leiga seg inn á fjarskiftiskervið hjá Føroya Tele, hevur Fjarskiftiseftirlitið nú skorið ígjøgnum í málinum og ásett prísin, sum Alnót skal gjalda Føroya Tele fyri at brúka fjarskiftiskervið.

Soleiðis eru tey formellu viðurskiftini viðvíkjandi atgongd til fjarskiftiskervið nú komin upp á pláss, og hjá Alnót er tískil bert eftir at keypa røttu útgerðina og fáa fyritøkuna skipaða, áðrenn farast kann undir at bjóða fjarskiftistænastur út til føroyingar.

Alnót hevur fyrr boðað frá, at fyritøkan í fystu atløgu fer at bjóða út internetsamband.

**Alnót bað um avgerð**

Alnót er ikki tann fyrsta fyritøkan, ið sleppur at leiga seg inn á fjarskiftiskervið hjá Føroya Tele, men hetta er fyrsta ferðin, at Fjarskiftiseftirlitið hevur verið noytt at skorið ígjøgnum og avgjørt málið.

Føroya Tele er samsvarandi lógini um fjarskifti bundið at loyva øðrum loyvishavandi útbjóðarum at leiga seg inn á sítt kervið. Hetta skal gerast fyri ein prís, sum Føroya Tele og hin útbjóðarin kunnu koma ásamt um.

Tað royndu Alnót og Føroya Tele, ið høvdu sínar fyrstu samráðingar í august mánaði í fjør. Men partarnir kundu ikki semjast, og í november heitti Alnót á Fjarskiftiseftirlitið um at royna semju í málinum. Tað varð so gjørt, men áðrenn tað kom til semju, bleiv tolið hjá Alnót uppi, og fyritøkan heitti á Fjarskiftiseftirlitið um at avgera málið.

Sambært lógini um um fjarskifti, skal Fjarskiftiseftirlitið taka eina avgerð, um so er at annar av pørtunum í einari slíkari trætu biður um tað.

**Minuttprísurin ásettur**

Talan er um eina rættiliga fløkta avrokningarskipan millum telefeløgini, men tað mest avgerandi er tann minuttprísur, sum Alnót skal gjalda Føroya Tele fyri nýtslu av telefonkervinum. Her valdi Fjarskiftiseftirlitið at áseta prísir, ið lógu nærri at prísuppskotinum hjá Alnót enn hjá Føroya Tele. Avgjørt varð, at fyri at brúka fasta telefonkervið hjá Føroya Tele, skal Alnót gjalda 7,7 oyru um minuttin í dagtaksti og 4,8 oyru um minuttin í kvøldtaksti. Haraftturat skal uppringingargjald á 10 oyru gjaldast fyri hvørja uppringing.

Hetta merkir, at tá Alnót fer at bjóða út internetsamband, skal fyritøkan gjalda Føroya Tele ávikavist 7,7 oyru og 4,8 oyru til Føroya Tele fyri hvønn minutt ein kundi hjá Alnót eru á netinum.

Men tá er bert goldið fyri nýtslu av telefonkervinum í Føroyum. Størsti parturin av tí, ið er atkomiligt ígjøgnum internetið, liggur á servarum uttan fyri Føroyar, og tá er neyðugt hjá Alnót at gjalda fyri at brúka fjarskiftiskervið millum Føroyar og meginlandið.

Her kann nýggja telefyritøkan velja annahvørt at gera avtalu við Føroya Tele um at leiga seg inn á kapasitetin hjá føroyska fjarskiftisveitaranum, ella sjálv at leiga kapasitet á til dømis Cantat kaðalinum frá onkrum útlendskum veitara.

**Alnót kappingarførar treytir**

Á Fjarskiftiseftirlitinum verður mett, at Alnót við avgerðini hevur fingið neyðugu fortreytirnar fyri at taka kappingina upp við Føroya Tele, bæði innan internet og eisini innan onnur sløg av fjarskiftistænastum, eitt nú uttanlandstelefonsamrøðum.

Føroya Tele tekur sum er 15 oyru um minuttin í kvøldtaksti fyri vanligt uppringt internetsamband. Skal Alnót bjóða slíkt internetsamband út, skal fyritøkan fyrst gjalda Føroya Tele 4,8 oyru um minuttin fyri nýtslu av føroyska fjarskiftiskervinum umframt eitt ávíst gjald fyri at nýta fjarskiftiskervið úr Føroyum til umheimin.

Við hesum burdi tað borið fyritøkuni til at bjóðað kappingarførar prísir í mun til Føroya Tele.

Stjórin á Føroya Tele, Andras Róin, segði fyrr í summar, at Føroya Tele uttan iva fer at lækka prísin fyri uppringt internetsamband, tá kapping verður um viðskiftafólkini.

Sum er er Føroya Tele einasti veitari av uppringdum internetsambandið. Onkur onnur fyritøka veitir fast internetsamband, men hesar tænastur eru mest ætlaðar fyritøkum.

Broytingar eru farnar fram í eigaraviðurskiftunum í telefyritøkuni Alnót, og í hesum sambandi er søkt eftir nýggjum stjóra. Hesin er ikki settur enn.

Sum skilst er tað væntandi, at Alnót fer at bjóða fjarskiftistænastur út í fyrsta lagi tíðliga komandi ár.



*Telefyritøkan Alnót hevur nú fingið neyðugu fortreytirnar fyri at taka kappingina upp við Føroya Tele.*

